# Haldur Nielsen, Haldur hjá Mallu

## til minnis



Sunnudagin 9. juni andaðist Haldor. Ein sera snøggur og raskur maður legði seg til hvíldar á foldarbeði sjeytifimm ára gamal. Ikki sást aldur á Halduri, men hugsast kann, at eftir jól í ár tyktist snúðurin vera farin úr honum, sum dottin burtur úr rovum. Hann var jú millum teirra, ið hvønn leygarmorgun var við í pensjónistasvimjingini, sum Arnfinnur Olsen tekur sær av, men var ikki við í hesum svamblandi hópi í síðstuni.

Haldur fekst nógv við seyð. Hann var røktingarmaður í Gjógvarahaga í mong ár, og átti hann seyð í Góðadali, Skarðhaga, Gjógvará, Klemmuni og Fjalli. Dygst við hús okkara, Norðuri við Bøveg, stóð hann her um veturin dag um dag og gav Fjalsseyðinum, og fingu vit mangan gott prát okkara millum. Hugsi um hann, nú slótturin stendur fyri, at hann fór altíð undir sláingina tætt við húsini og kom so niðan eftir, niðan móti Bakkabrunninum, og so lá leiðin longur niðan. Her var Haldor heilur og sælur í hesum umhvørvi. Vincent van Gogh hevur málað sáðmannin, slóttumannin og hoyggingarfólk …. gjørt tey ódeyðilig í myndum sínum. Sum varðar tey standa í frásøgum hansara t. d. frá Saint Rémy, har hann málaði fleiri slíkar myndir í september og oktober í 1889. Hetta kundi eisini verið fólk á bygd í Føroyum, sum her vórðu avmyndað. Lagið er tað sama, íblásturin hin sami, grasið, hoyggið tað sama og liturin hin sami. Slóttumaðurin er ein alheims mynd, og stendur Haldor nú ljóslivandi sum ein spegilsmynd í myndum Vincent van Goghs.

Í grannalagnum gekk prátið ofta um seyð og seyðahald. Nú eru so Kjartan, Oluffa og Haldur farin úr hesum lítla hópi. Ikki so sjáldan róðu orðini upp undir dagsløtur í hoyna og á fjalli. Hetta er røkt fyri sinn og sál, at møtast og hava eina talingarløtu um tað, sum tú ert felags um. Tað fellur monnum og kvinnum lætt at koma á tal í góðum seyðapráti, í sløttinum og tá ið hoyggið skal fáast til høldar. Her vella orð fram úr lættum támi í strokum - sum í myndum van Goghs, og eru mong orð av Haldursa munni sett seg í Bøveg og í hógvin omanvert her.

Líggjasangurin stendur á tí grøna svørðinum frá farnum tíðum, har stráini leiftra í summarlotinum og bíða eftir eigarmanninum, sum yndisliga finnast í glógvandi litrípum hjá listamanninum van Goghs. Í teimum er Haldor Nielsen.

Hetta var bara nakað, sum rann mær til hugs, nú friðarmaðurin Haldor er farin burtur úr grannalagnum, og saknaður verður hann.

Friður veri við minnunum um Haldor.

**Frits**

# Heiðrað fyri langa og trúgva tænastu

**Sjey arbeiðsfólk á Fiskavirking í Saltangará fingu síðsta fríggjadag diplom, blómur og gávur fyri at hava verið í starvi á virkinum í samfull 25 og 30 ár.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Jason Johannesen og Meinhard Jacobsen saman við teimum sjey arbeiðsfólkunum, sum seinasta fríggjadag vórðu heiðrað við diplomi, blómum og gávum fyri ávikavist 25 og 30 ára trúgva tænastu á Fiskavirking í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað eru ikki øll, sum halda tað vera keðiligt at arbeiða í fiskivinnuni. Í hvussu er eiga vit nógv fólk á flakavirkjunum kring landið, sum hava starvast leingi innan hesa vinnugrein. Tíverri hoyrist ikki nógv um hesi, og heldur ikki hevur so nógv verið gjørt burtur úr, tá ið tey hava havt starvsdagar, ið áttu at verið "markeraðir".

Men Føroya Fiskavirking hevur nú tikið táttin uppaftur at heiða fólk, sum hava verið leingi í starvi hjá felagnum - eisini fyri tíðina, tey arbeiddu á virkinum undir gomlu eigarunum, ið vanliga vóru bygdafólkið og eitt nú arbeiðarafeløgini.

Undir stóru samfelagskreppuni fyrst í nítiárunum hendi tað, at Føroya Fiskavirking varð stovnað og komu flestu flakavirki tá undir "hattin" hjá hesum stóra felag, ið má sigast at hava megnað sína uppgávu rættiliga væl.

Flestu virkir, sum felagið eigur kring landið, vóru gomul og rættiliga slitin, tá ið felagið tók um endan, men við tíðini hevur eydnast Føroya Fiskavirking at nútímansgera hesi virkir, so fleiri teirra í dag standa mát við tey nýggju fiskavirkini í eitt nú Íslandi.

### Heiðraðu 7 fólk

Nógv fólk, sum starvast í flakavirkisvinnuni í dag, hava verið í hesi vinnu í 25-30 ár, og tað er long tíð. Hesi fólk saman við øðrum eru virðismikil fyri arbeiðsplássini. Tey hava allar tær royndir á sínum øki, sum hugsast kunnu og hava verið við í allari teirri menning, sum farin er fram innan framleiðsluvinnuna - ikki minst hesi seinastu 10 árini.

Føroya Fiskavirking hevur seinastu árini heiðrað fleiri arbeiðsfólk, sum hava verið í starvið á virkjunum, sum felagið nú eigur.

Seinasta fríggjadag var so túrurin komin til virkið í Saltangará, har sjey fólk hava verið í starvi í ávikavist 25 og 30 ár.

Sosialurin var við, tá ið stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen og virkisleiðarin, Jason Johannesen, handaðu hesum sjey fólkum diplom, blómur og gávur.

Tey, sum vórðu heiðrað fyri 25 ára tænastu, vóru Lina Højgaard, Svanhild Hansen, Ingemar Olsen og Meinhard Lamhauge.

Trý fólk hava starvast á virkinum í samfull 30 ár; tey eru Julius Steingrund, John Nielsen og Viggo Hansen.

Á samkomu í matarhøllini á Fiskavirking í Saltangará fríggjadagin takkaði Meinhard Jacobsen hesum fólkum fyri langa og trúgva tænastu.

Umframt diplom og blómur, fingu konufólkini hálsband, armband og oyraringar. Menninir fingu eisini diplom og blómur og fáa eisini eina klokku í part, sum enn ikki er liðug; klokkan verður handað eftir summarfrítíðina.



*Jason Johannesen er virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará. Hann telist millum mest royndu virkisleiðarar í Føroyum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



Syndarligur eldsbruni:

# Tveir brøður lótu lív

**Serfrøðingar hava enn ikki staðfest orsøkina til ta syndarligu vanlukkuna, sum hendi sunnunáttina, tá eldur kom í eini hús á Gripsvegnum í Havn. Tveir brøður, sum vóru 6 og 8 ára gamlir, komu ongantíð út úr húsunum og lótu lív í logunum**

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*



*Tveir smádreingir lótu lív í hesum húsunum, tá tey brunnu í grund sunnukvøldið. Sløkkiliðið hevði ongan møguleika at bjarga dreingjunum ella húsunum*
*MYND: Eirikur Lindenskov*

Tað, sum skuldi vera ein góð summarfrítíð í Føroyum, endaði í sorgarleiki. Teir báðir dreingirnir, sum lótu lív, vóru júst komnir heim til Føroya tveir dagar frammanundan vanlukkuni. Teir búðu í Odense og vóru komnir til Føroya við systrini at vitja pápa sín í Føroyum.

Politiið fekk fráboðan um eldsbrunan klokkan 04.04, men húsini brunnu í grund, áðrenn eldurin varð bastur.

Tað eydnaðist pápanum at dreingjunum og eini 16 ára gamlari dóttrini at bjarga sær út úr húsunum við at leypa frá einum hálvtaki í loftshæddini. Dóttirin fekk smávegis mein í ryggin av hesum, meðan pápin slapp óskalaður.

Pápin vakti síðani eitt par, sum búði í kjallaranum. Kvinnan, ið er 32 ára gomul, og maðurin, sum er 40 ára gamal, sluppu sær út við 11 ára gomlu dóttrini. Eigarin av húsunum, sum er bróðir pápan at dreingjunum, slapp eisini óskaddur úr húsunum.

### Serfrøðingar úr Danmark

Løgreglan í Havn hevur boðsent serfrøðingum innan eldsbrunar úr Danmark. Hesir kanna í løtuni húsini og orsøkin til eldin.

Løgreglan er eisini farið undir avhoyringar av eygnavitnum, sum kanska kunnu vera við til at staðfesta orsøkina.

# Húsini vóru sera eldfim

**Húsini, sum brendu sunnunáttina, vórðu kløðd innan við sera eldfimum plátum. Celloteks-plátur, sum tær verða nevndar, eru bannaðar at nýta nú, men nógv hús hava framvegis slíkar vandamiklar plátur**

ELDSBRUNI
*Stefan í Skorini*



*– Húsini kundu ikki bjargast, tá vit komu á staðið og ikki var hugsingur um at sleppa inn, sigur Kartni Jacobsen, leiðari á sløkkiliðsstøðini. Húsini vórðu kløðd innan við plátum, sum lata sera eldfimt gass frá sær, tá tað gerst heitt*

*MYND: Eirikur Lindenskov*

Hesar bleytu pláturnar, sum húsini vórðu kløðd við innan, lata eitt sera eldfimt gass frá sær, tá hitin fer uppum 70 hitastig. Hetta sigur Kartni Jacobsen, leiðari hjá sløkkiliðnum í Havn. Hann var sjálvur á staðnum sunnunáttina, tá tveir smádreingir lótu lív í einum ræðuligum eldsbruna.

Pláturnar, sum tapetið er fest á, hava verið bannaðar at nýta í húsum seinastu tíggju árini, tí tær eru so sera eldfimar. Kartni greiðir frá, at gassið beinleiðis fýsir úr plátunum, tá tað gerst heitt.

Eygnavitni hava greitt frá, at eldurin brádliga blussaði upp, og orsøkin til tað er gassið frá plátunum.

### Bannað síðan 1992

Petur Olsen á Brunaumsjón Landsins upplýsir fyri Sosialinum, at forboð varð sett ímóti at nýta celloteks-plátur í 1992, tá kunngerðin um brunatrygd og brunaverju varð sett í gildi.

Hann sigur, at hesar pláturnar hava verið nógv nýttar síðan fimmti- og sekstiárini. Tær hava tó fleiri góðar eginleikar. Tær doyva væl ljóð uttanifrá, regulera vætuna í rúmum og so eru tær sera hentar at arbeiða við, tí tær eru léttar at skera.

Petur Olsen sigur, at tá menn eisini fóru at klæða hús uttaná við bleytum plátum, var bannið sett í gildi. Tær bleytu pláturnar, sum verða nýttar uttaná húsum, verða nevndar Norbit-plátur.

Bygningar, sum verða nýttir til dagstovnar og skúlar, verða ikki góðkendir av Brunasumsjón Landsins, um teir eru klæddir við celloteks-plátum.

Tað eru sostatt fleiri hús í Føroyum, ið hava tær eldfimu celloteks-plátur í stovunum.



*Tann eini bilurin hjá sløkkiliðnum stóð so nær við eldin, at ljós, rútar og spegl smeltaðu í øgiliga hitanum*

*MYND: Eirikur Lindenskov*

### Húsini vóru ikki at bjarga

– Tá vit komu á staðið vóru húsini ikki til at bjarga. Tað sá eg eisini heimanifrá, at eldurin longu var ov stórur. Tað var ikki hugsingur um at sleppa inn, og vit arbeiddu mest við at bjarga hinum húsunum í grannalagnum, tí eldurin var so smátt farin at breiða seg, sigur Kartni Jacobsen. Hann leggur afturat, at talan bert var um sekund, frá at eldurin festi í aðrastaðni við.

Bara tveir rútar vóru heilir, tá sløkkiliðið kom á staðið, og tað var skjótt at hesir eisini brustu í hitanum.

Húsini á Gripsvegnum standa sera tætt, og tí var tað skjótt at eldurin tók í takskeggið á øðrum húsum.

Tað eydnaðist tó sløkkiliðsmonnunum at steðga eldinum, so at hann ikki breiddi seg.

Sera trongligt er á Gripsvegnum, og hetta darvaði sløkkiliðnum nakað. Tann eini bilurin hjá sløkkiliðnum kom at standa ov nær við eldin, og tað hevði við sær, at rútar, ljós og spegl smeltaðu. Sløkkiliðið hevði sum heilt torført við at nærkast húsunum, tí hitin frá eldinum var øgiligur.

### Stór mannamúgva

Boðini um eldin komu um fýra tíðina á nátt. Hetta er tíðin, tá náttklubbarnir í Havn lata aftur, og tí var ein stór mannamúgva savnað rundanum eldsbrunan.

Kartni greiðir frá, at onkur hevði til frægd at tveita fýrverk uppá takið á húsunum. Hann heldur, at fólk áttu at duga sær hógv í slíkum álvarsomum løtum. Eisini verður sagt frá, at fullir menn fóru til hendurs nærhendis húsunum, og at løgreglan mátti leggja uppí.

# Tríggir tiknir fyri ferð

FERÐMÁTING
*Stefan í Skorini*

Ferðsluløgreglan var leygarkvøldið úti við ferðmátaranum, og tríggir ungir mans duttu í felluna. Mátingarnar vórðu gjørdar í Kaldbaksbotni, har førarar mangan hava hug at koyra heldur skjótt á tí góða og breiða vegnum.

Teir tríggir førararnir vórðu allir tiknir fyri at koyra umleið 120 kilometrar um tíman. Hetta hevur við sær, at teir væntandi fáa ein treytaðan dóm og skulu upp til nýggja koyriroynd. Tað vil siga, at um teir bróta ferðslulógina einaferð næstu trý árini, missa teir koyrikortið treytaleyst.